## 100 ára merkir




*Tey bæði fótbóltsfrímerkini, sum markera 100 ára dagarnar, verða givin út 24. mai*

Umframt at HBog KÍ bæði gerast 100 í ár, fyllir altjóða fótbóltssamgongan, FIFA, eisini runt.

Og á Postverki Føroya hava tey so gjørt av, at hetta er nakað, sum skal markerast.

24. mai verða tvey nýggj frímerki givin út, sum markera 100 ára dagarnar. Annað merkið er áljóðandi 5 krónur, og avmyndar hetta teir báðar, Kurt Mørkøre og Hans á Lag í dysti millum HB og KÍ. Hartil eru nýggju 100-ára búmerkini hjá teimum báðum feløgnum avmyndað á frímerkinum.

Hitt merkið - sum altso markerar dagin hjá FIFA – er áljóðandi 6,50 kr., og er motivið her ein dystarmynd frá fótbóltslandsdystinum millum Føroyar og Týskland, sum varð leiktur á Tórsvølli í fjør.

Tað er Símun á Høvdanum í Klaksvík, sum hevur tikið myndirnar, sum verða nýttar á frímerkjunum.

*-jm*

## Til gongu til Vestmanna á Bátastevnu

**Gongufeløg fara aftur í ár at skipa fyri gongutúri til Vestmanna í sambandi við bátastevnuna, sum verður har 15. mai. Hesaferð verður gingið eftir gomlu varðagøtuni úr Saksun**

GONGUTÚRUR
*Tíðindaskriv*

Gongufeløgini í Vágum, Havn og Eysturoynni gjørdu í fjør ein gongutúr til Vestmannar í sambandi við Bátastevnuna Kjalarvatn.

Hetta varð ein góður túrur. Stuttligt var at fylgjast við gongufólkum úr øðrum feløgum, og hugnaligt var at koma til Vestmannar, síggja bátarnir og hitta fólk, so semja varð um at endurtaka tiltakið.

Bátastevnan Kjalarvatn verður aftur nú leygardagin 15. mai. Tá ætla gongubólkarnir at ganga til Vestmannar, so vit síggja bátarnir, tá teir stevna norður gjøgnum Vestmannasund.

– So komið øll gongufólk og latið okkum aftur stevna móti Vestmanna hesaferð eftir gomlu varðagøtuni úr Saksun. Neyðugt er at melda seg til á kunningarstovunum, so vit kunnu skipa fyri farti til Saksunardalin, haðani byrjað verður at ganga kl. 11. Bussur fer úr Havn kl. 10, og er áhugi fyri tí, verður eisini skipað fyri bussi aftur úr Vestmanna. Vágafólk og Eysturoyingar í bili sleppa upp í bussin við tunnilsmunnan í Kollafirði.

Tilmelding fer fram á kunningustovunum kring landið.

# Eg biði ikki um meir



*Eg ætli mær ikki at biðja um fleiri pengar. Tað liggur ikki til landsstýrismannin við fíggjarmálum at biðja um fleiri pengar, so eg má royna at halda meg til tað, sum eg nú einaferð fái játtað, sigur Bárður Nielsen*

**Bárður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, sigur, at hann fer ikki at biðja um meira pening, nú fíggjarnevndin hevur gjørt av at skerja seks milliónir netto á hansara málsøkjum**

FÍGGJARLÓG
*Hans Kárason Mikkelsen,*
*hans@sosialurin.fo*

- Vit mugu royna at tillaga okkum teimum broytingum, sum fíggjarnevndin er komin við, segði Báður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, í tinginum týsdagin, tá fíggjarlógin var til viðgerðar.

Men hann leggur afturat, at nøkur ting verða helst trupul at liva upp til. Til dømis vísir hann á rentustuðulin.

- Tað sum eg serliga havi gjørt vart við, tað er rentustuðulin, sum er ein játtan, ið eg ikki vænti kemur at halda, sigur Bárður Nielsen.

Men hann ætlar sær ikki at biðja um fleiri pengar, tá Løgtingið hevur triðju og síðstu viðgerð hósdagin.

- Eg ætli mær ikki at biðja um fleiri pengar. Tað liggur ikki til landsstýrismannin við fíggjarmálum at biðja um fleiri pengar, so eg má royna at halda meg til tað, sum eg nú einaferð fái játtað, sigur Bárður Nielsen.

Hann sigur tó eisini, at tað kann væl verða, at rentan fer upp. Um tað hendir, fær Bárður Nielsen brúk fyri eykajáttan til rentustuðulin. Fíggjarnevndin metir ikki, at stórvegis rentu-hækking er á veg.

- Hetta er ein meting. Tað kann verða, at teir fáa rætt, og tað kann verða, at eg fái rætt, sigur Bárður Nielsen.

Bárður Nielsen svaraði eisini í Løgtinginum upp á tær viðmerkingar hjá fíggjarnevndini um, at ávísir grunnar og landsstovnar ikki eru tiknir við á fíggjarlógina, og at hetta "er í stríð við stýrisskipanarlógina."

- Trupulleikin við grunnum og landsstovnum er ein gamal trupulleiki, sigur landsstýrismaðurin og leggur afturat, at hann væntar ikki, at hann klárar at fáa hesi tingini upp á pláss til komandi fíggjarlóg, sum fíggjarnevndin annars eftirlýsir. Hetta tí fíggjarlógin fyri 2005 skal leggjast fram um einar fimm mánaðir.

Løgtingsgrannskoðararnir og løgtingsnevndirnar hava nú í fleiri ár víst á trupulleikarnar, uttan at nakað er tikið til eftirtektar.

Triðja viðgerð av fíggjarlógini er í Løgtinginum hósdagin.

# Tarira á konsertferð kring landið

**Í næstum fer kórið Tarira, undir leiðslu av Sunleivi Rasmussen, á konsertferð í Føroyum**

KONSERTFERÐ
*tíðindaskriv*

Konsertirnar verða hildnar í fýra ymiskum kirkjum kring landið, og skráin bjóðar uppá 3 sera spennandi verk, sum ikki hava verðið framførd áður her á landi. Talan er um eitt verk eftir Robert Whyte og tvey verk eftir Arvo Pärt, og skráin er sostatt samansett av heilt gomlum enskum renesansu-tónleiki eftir Whyte, sum livdi i tíðarskeiðnum 1535-1574 og so nýggjum estoniskum tónum eftir Pärt, sum er føddur í 1935, júst 400 ár eftir Whyte. Tað er ikki av tilvild at hesi 3 verkini eru á somu konsertskrá, tí hóast heilar 4 øldir eru imillum tey, so hava tekstirnir felags evni, nevnliga páskirnar og hvítusunnuna. Hartil nýtir Pärt í hesum báðum verkunum tey kirkjutonalu tónasløgini, sum eisini vórðu nýtt í renesansuni. Fýra tónleikarar eru við í ferðini, teir eru Sámal Petersen violin, Nicolas Kapnas bratsch, Jens Chr. Guttesen cello, og Heðin Kambsdal, orgul.

Konsertirnar, sum verða hildnar á ferðini eru:

Sunnudagin 16. mai í Sandavágs kirkju kl. 15.00

Sunnudagin 23. mai í Gøtu kirkju kl. 16.00

Fríggjadagin 28. mai í Húsavíkar kirkju kl. 19.00

Sunnudagin 31. mai í Vesturkirkjuni í Havn kl. 19.30

Konsertirnar vara ein tíma uttan steðg og eru ókeypis. Hetta er ein frálíkur og einanstandandi møguleiki at hoyra nýggjan og góðan gamlan kórtónleik.



*Frá sunnudegnum komandi og tey bæði eftirfylgjandi vikuskiftini fer Tarira at hava framførslur kring landið*



# Fer ikki at taka pensil í hond

**Eftir leiðandi arbeiðsroyndir í bankaverðini, politisku fyrisitingini og vinnuni skal 40 ára gamla Mathea Hilduberg nú royna seg millum penslar, málningar og standmyndir sum nýggjur leiðari á Listasavni Føroya. – Eg elski nýggjar avbjóðingar, og tað fjølbroytta og skapandi við hesum starvi er lokkandi, men eg fari ikki at royna meg sum listakvinnu, sigur Mathea Hilduberg flennandi**

LIST
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*- Listin hevur so ómetaligan týdning, tí hon avspeglar á ein ella annan hátt samfelagsligu gongdina og menningina, og so hvørt sum mentan okkara broytist, avmyndast hetta í listini, heldur Mathea Hilduberg, nýggjur leiðari á Listasavni Føroya*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hon hevur starvast m.a. sum projektleiðari og marknaðarleiðari í Føroya Sparikassa, búskaparfrøðingur á Løgmansskrivstovuni og fíggjarstjóri á p/f Snodd, og frá 1. juli er karrierukvinnan ovasti myndugleikin á Listaskálanum. Eftir tíggju umsóknir fall valið og stóra ábyrgdin á 40 ára gomlu Mathea Hilduberg, sum eftir royndir í bankaverðini, politisku fyrisitingini og vinnulívinum nú skal leiða listarliga heimin víðari. Sjálv metir hon tó ikki, at munurin er so stórur á núverandi starvi samanborið við áðurevndu arbeiði hennara.

### Gamlar royndir í nýggjum yrki

– Leiðarastarvið á Listasavninum hevur nógv til felags við áðurnevndu royndir mínar í t.d. Sparikassanum, tí í báðum førum er nýskapan og nýhugsan ein fortreyt fyri menning, eins og nýggja starvið í Listaskálanum eisini er projektorienterað, sigur Mathea Hilduberg. Hon greiðir frá, at eitt neyðugt kynstur er støðugt at finna fram til nýggj konsept, og at hetta eisini er ætlanin í nýggja starvinum.

– Eg síggi hópin av menningarmøguleikum fyri Listaskálan, og m.a. tí er starvið attraktivt, greiðir Mathea frá. Hon sigur seg elska nýggjar avbjóðingar, og tí er nýggja starvið ein náttúrlig gongd í persónligu menning hennara.

– Hóast eg nú taki við einum nýggjum starvi, kunnu royndirnar frá fyrrverandi størvum takast við og í stóran mun nýtast, sigur nýggi leiðarin á Listaskálanum.

### Listfrøðingur afturat

Hóast hon verður ovasti myndugleiki Listaskálans, verður talan á fyrsta sinni í føroyskum høpi um eina tvístreingjaða leiðslu við Matheu og einum nýggjum listfrøðingi, sum í nærmastu framtíð skal setast.

– Hóast tað ikki er ókent uttanlands, hevur hesin bygnaður ikki verið royndur áður í Listaskálanum, og meðan eg skal taka mær av tí fíggjarliga, marknaðarliga og umsitingarliga, verður uppgávan hjá listfrøðinginum at hava sjálva listina undir hond, greiðir Mathea frá. Við hesum sipar hon til, at listfrøðingurin fyrst og fremst skal hava ábyrgdina av savninum, framsýningum og listarligum raðfestingum.

– Eg ímyndi mær, at hetta uppgávubýtið bert kann verða til fyrimuns fyri Listaskálan, tí fyrr hevur ein einsmallur stjóri havt alt undir sær, hóast talan er um tvey heilt ymisk øki, sigur Mathea Hilduberg. Hon sigur, at ein av fyrstu uppgávum hennara er at ogna sær betri innlit í og vitan um føroyska listarlívið.

### Heldur seg til tað fíggjarliga

Fyri Matheu Hilduberg er Listaskálin tó ikki eitt ókent umhvørvi, tí fyrst í árinum hevur hon í tveir mánaðir arbeitt við eini verkætlan við aðalendamálinum at fáa skrásett alla føroyska list, sum er tengd at Listaskálanum. Umframt hetta eru myndir tiknar av øllum verkum, og datagrunnur Listaskálans er ajourførdur. Hetta megnar arbeiði hevur Mathea staðið fyri, og tí er hon ikki heilt ókend í mentanarháborgini í Gundadali.

– Hesa tíðina havi eg upplivað eina sera góða atmosferu og umhvørvi á Listaskálanum, og tað hevur jú eisini verið ein orsøk til, at eg søkti um leiðarastarvið, sigur nýklakti leiðarin á Listaskálanum.

Spurd, um hon sjálv hevur gjørt nakað við list, ella um nýggja starvið fer at eggja hana sjálva at royna seg sum listakvinnu, er Mathea avgjørd.

– Nei nei, eg kenni mínar avmarkingar, og eg fari so neyvan at gera meg galdandi sum nakar listarligur meistari, sigur Mathea Hilduberg flennandi. Hon sigur, at hennara uppgáva fyrst og fremst verður at skapa karmar fyri einum blómandi mentanarlívi í Listaskálanum, men so fer hon altso ikki longur, heldur hon smílandi fyri.

### Tey ungu skulu við

Viðvíkjandi endamálum og nýggjum ætlanum, Mathea saman við listfrøðinginum ætlar at fremja, liggur henni nógv á hjarta, men fyrst og fremst nevnir hon, at listin skal gerast attraktivari fyri unga ættarliðið.

– Hetta kann m.a. fremjast við nærri samstarvi millum Listaskálan og skúlar kring landið, og størri dentur skal leggjast á gransking innanfyri list, sigur Mathea Hilduberg. Aðalendamálini eru umframt hetta at savna og varðveita listarligu framleiðsluna, at gera føroysku listina sjónligari uttanlands, at fáa fleiri vitjandi um veturin, tá Listaskálin mangan stendur tómur, og til seinast at betra um kunningarviðurskiftini á Listaskálanum, so vitjandi vit øktari upplýsing fáa eina so kvalitativa uppliving sum gjørligt.

- Ymsir hættir eru at røkka hesum endamálum, og tað er uppgávan, eg og ein komandi listfrøðingur skulu finna fram til, sigur Mathea.

### Stór ábyrgd

Karrierukvinnan við royndum úr bankaheiminum, politisku fyrisitingini og vinnulívinum setir sostatt hol á eitt nýtt tíðarskeið, hesaferð á listarliga økinum, og sær hon eina stóra ábyrgd fyri framman.

– Listin hevur so ómetaligan týdning, tí hon avspeglar á ein ella annan hátt samfelagsligu gongdina og menningina, og so hvørt sum mentan okkara broytist, avmyndast hetta í listini, heldur Mathea. Hon metir seg tí hava eina stóra ábyrgd sum ovasti myndugleikin á Listasavni Føroya, og hóast hon neyvan sjálv tekur pensil í hond, men heldur seg til tað fíggjarliga, tykist leiðarin vera tilvitað um tann heim, hon í næstum skal føra víðari.

### Fakta um Matheu Hilduberg

Aldur: 40 ár
Hjúnastøða: Gift og trý børn
Bústaður: Í Havn
Útbúgving: Búskaparfrøðingur við sergrein í marknaðarføring
Starv: Fimm ára sáttmáli við Listasavn Føroya
Fyrrverandi størv: Føroya Sparikassi, Løgmansskrivstovan, Granskingarráðið, P/f Snodd, Bikuben (danskur peningastovnur)